# Volvo trygdarskipan best í ADAC test

Heimsins størsti felagsskapur av bilaeigarum, ADAC í Týsklandi, hevur gjøgnumført sína fyrstu test av ymiskum skipanum til automatiska stýring av ferð og frástøðu í bilum.

Vinnarin av testini varð Volvo XC60 við sínum innbygdu trygdarskipanum, sum eru serliga góðar til at sleppa undan ferðsluóhappum.

Tá vandi er á ferð undir koyring, verður bilførarin ávaraður eini reyðari lampu, sum blinkar í sjálvum forrútinum. Við eini ferð undir 30 km/t hevur bilurin City Safety, sum er ein innbygd laserteknologi, ið heldur eygað við øllum, sum standur stilt, og tí sum rørir seg í ferðsluni, og bremsar bilinum automatiskt, um vandi er á ferð sum t.d. tað at ein fótgangari er á koyribreytini.

*Kelda: Volvo Personvogne Danmark A/S*



City Safety heldur eygað við fótgangarum á koyribreytini



Volvo XC60 við sínum innbygdu trygdarskipanum gjørdist vinnarin av testini hjá ADAC

# Flottasti bilur í 2009





Peugeot RCZ er kosin fl ottasti bilur í 2009 av International Automobile Festival við meira enn 100.000 internetbrúkarum

Spildurnýggi sportbilurin Peugeot RCZ er kosin flottasti bilur í 2009.

International Automobile Festival við meira enn 100.000 internetbrúkarum hevur kosið Peugeot RCZ sum flottasta bil í 2009.

Peugeot RCZ varð frumsýndur á altjóða bilaframsýningini í Frankfurt í heyst, har 200 bilar vórðu bílagdir. Bilurin verður gjørdur bæði sum bensin og diesel, eins og í eini 4x4 hybridútgávu.

Peugeot RCZ kemur á marknaðin í apríl í ár.

*mg*



Daimler AG hevur latið 20 Mitsubishi Fuso Canter lastbilar sum gávu til hjálpararbeiðið á Haiti

# Mitsubishi Fuso til Haiti

Týska Mercedes verksmiðjan Daimler AG gevur í hesum døgum 20 Mitsubishi Fuso Canter lastbilar til hjálpararbeiðið eftir jarðskjálvtan á Haiti.

Lastbilarnir eru latnir til hjálparfelagsskapin, sum fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton setti á stovn eftir náttúruvanlukkuna. Bilarnir skulu brúkast til flutning av neyðhjálp frá havnum og lufthavnum til tey neyðstøddu kring um í landinum.

Daimler AG er høvuðspartaeigari í Mitsubishi Fuso Truck and Bus Corporation í Japan.

*mg*